

www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 09 - 2012

# Norska framleiðslan minkaði í august

Noreg framleiddi minni olju í august enn mánaðin frammanundan, og sambært Oljustýrinum var minkingin størri, enn stýrið hevði roknað viðm skrivar Aftenbladet. Ein fyribilsuppgerð vísir, at tann dagliga framleiðslan í august var 1,836 milliónir tunnur av olju, NGL og kondensati. Tað er 45.000 tunnur minni um dagin enn í juli. Samlaða gasssølan í august var 8,2 milliardir rúmmetrar ella 0,8 milliard rúmmetrar minni enn í juli. Oljustýrið sigur í einari fráboðan, at oljuframleiðslan á norskum øki var trý prosent niðan fyri prognosuna hjá stýrinum fyri august mánað. Orsøkin til minkingina var umvælingararbeiði og eftirkanning á leiðunum Glitne, Snorre, Tordis og Åagard. Harumframt vóru leiðirnar Valhall og Hod stongdar allan august mánað, tí arbeitt varð við at fyrireika framleiðslubyrjan til ein nýggjan pall. Oljustýrið sigur, at higartil er framleiðslan á norskum øki 0,5 prosent minni enn metingin hjá stýrinum fyri 2012. Framleiðslan higartil er 969 milliónir tunnur. Av hesum eru 389 milliónir tunnur olja, og umleið 76,9 milliónir Sm av gassi er selt. Samanumtikið er tann samlaða nøgdin 58,5 milliónir tunnur størri enn um somu tíð í 2011, sigur Oljustýrið.

